# Oddagrein

**Eirikur Lindenskov**
*eirikur@sosialurin.fo*



# EIN ORDANS SKORTFLEINGJA

Tað er ikki hissini skorfleingja, sum Løgtingsins Umboðsmaður gevur Innlendismálaráðnum í sambandi við viðgerðina av einum máli um at geva nøkrum grannskoðarum góðkenning sum løggildir grannskoðarar. Trupulleikin var, at hesir sjey umsøkjarar ikki luku krøvini at fáa hesa løggilding, tí teir høvdu ikki verið til eina próvtøku, sum krevst. Men teir fingu kortini hesa góðkenning. Tá níggju aðrir grannskoðarar ikki fingu somu sersømdir - hóast teir høvdu somu útbúgvingarligu og verksligu royndir, sum hinir, kærdu teir.

Og umboðskvinnan er óvanliga harðmælt. Hon tosar um, at Innlendismálaráðið ikki hevur grundarlag fyri niðurstøðuni, at frágreiðingar frá Innlendismálaráðnum eru óskiljandi, at aðalstjórin í Innlendismálaráðnum er ógegningur, og at avgerðir av somu orsøk eru ógildugar. Umboðskvinnan heldur tað eisini vera serstakliga atfinningarsamt, at Innlendismálaráðið í hesum málið nýtir norskar reglur sum grundarlag, reglur, sum als ikki eru galdandi í Føroyum.

Umboðskvinnan vísir eisini á, at av tí at viðgerðin av málinum varð flutt úr Vinnumálaráðnum orsakað av ógegni, so kundi Vinnumálaráðið ikki á nakran hátt viðgera málið. Tí heldur Umboðsmaðurin talan vera um ósakliga fyrisiting í Vinnumálaráðnum, tí bæði embætisfólk og landsstýrismaðurin í vinnumálum settu seg í fleiri førum í samband við Skráseting Føroyar um málið og luttóku á fundi við umsøkjarar um kærurnar. Umboðsmaðurin sigur, at talan er um álvarsligar feilir og brek við viðgerðini hjá Innlendismálaráðnum og Vinnumálaráðnum, og tí hevur hon sent formansskapinum í løgtinginum, løgmanni og landstýrismonnunum í innlendismálum og vinnumálum frágreiðingina.

Uttan at vit á hesum stað skulu fara inn í smálutirnar í hesi frágreiðing, so bendir í øllum førum óvanliga hvassi samandrátturin í frágreiðingini á, at nógv er, sum als ikki gongur rætt fyri seg í Innlendismálaráðnum og í Vinnumálaráðnum.



Og tað er sera álvarsamt. Í blaðnum í dag viðgera vit júst stjórahøvd, sum rulla – ofta tí at leiðslan hevur tikið skeivar avgerðir, ella tí at myndugleikin oman fyri leiðsluna ikki hevur álit á leiðsluni meira.

So seint sum í síðstu viku avhøvdaði landsstýriskvinnan í Innlendismálum ein stovnsleiðara. Sera áhugavert verður nú at vita, hvussu leikur fer.

## Talan er um álvarsligar feilir og brek við viðgerðini

# Hvalbingar handað Anniku uppskot um tunnil

Annika Olsen fekk í dag uppskot um nýggjan Hvalbiartunnil, sum er mettur at kosta um 150 milliónir krónur.

Hvalbingar hava í dag verið á fundi í Innlendismálaráðnum, og har handaðu teir Anniku Olsen, landsstýriskvinnu í innlendismálum, uppskot um nýggjan tunnil millum Trongisvág og Hvalba.

Tað er Hvalbiar Kommuna, sum hevur latið gjørt eitt uppskot við linjuføring og kostnaðarmeting. Eftir ætlan skal tunnilin fara inn á leið Sterling í Trongisvági og koma út aftur beint innan fyri Káragjógv í Hvalba.




Hvalbiar Kommuna hevur fingið eina fyritøku at gera eina kostnaðarmeting at gera hesa linjuføringina, sum verður umleið 3.300 metrar. Og metingin ljóðar uppá 150,7 milliónir krónur.

- Hvalbiar Kommuna hevur tí heitt á landsstýriskvinnuna um at arbeiða við at fáa hetta uppskot framt so skjótt til ber, tí verandi støða er ótolandi fyri hvalbingar og vinnulívið í bygdini, sigur Rúni Thomsen, umboðandi Hvalbiar kommunu.



*Soleiðis ímynda hvalbingar sær linjuføringina í sambandi við nýggja tunnilin*



## Tilfeingisgjald á útjaðaran

POUL HANSEN
KJAK Á SÍÐU 16



## Skelkandi at síggja høli Tjóðpalsins

HANS PAULI STRØM
KJAK Á SÍÐU 10

# Høgir prísir – færri alkoholtrupulleikar

- Høgir prísir á rúsdrekka minka um nýtsluna. Tí er príspolitikkur eitt sera hent amboð – sum er nógv munadyggari enn aðrir fyribyrgjandi hættir.

Hetta er úrsliti av nýggjari kanning, sum granskarar á University of Florida í USA hava gjørt og sum verður kunngjørd í novemberblaðnum í vísindaliga tíðarritinum American Journal of Public, skrivar Science Daily.

Sambært hesum hava kanningar seinastu 50 árini víst, at høgir prísir á rúsdrekka gevur tað úrsligt, at minni verður drukkið og harvið eina merkisverda minking av óhepnum fylgjum av at drekka sterkt, sigur professarin Alexander C. Wagenar, sum hevur staðið fyri kanningini, í blaðnum Science Daily.

Kanningar vísa, at verður alkoholavgjaldið tvífaldað, so minka deyðsføll av rúsdrekka við 35 prosentum, ferðsluvanlukkur av rúsdrekka minka við 11 prosentum, kynssjúkur minka við seks prosetnum, harðskapur minkar við tveimum prosentum og samlaða talið av brotsverkum minkar við 1,4 prosentum.

Sambært granskarunum eru høgir alkoholprísir nógv effektivari at minka skaðum av rúsdrekka, enn fyribyrgjandi tiltøk av ymsum slag.




Sosialurin
Tel. 341800
www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

**Marknaðardeild**
lysing@sosialurin.fo

**Tórshavn** Tórsgøta 1, Postboks 76, 100 Tórshavn
tel. 341800, fax 341801, post@sosialurin.fo

**Norðoyggjar** Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687, klaksvik@sosialurin.fo

**Suðuroy** tel. 375364, fax 375464, tel. 228814,
aki@sosialurin.fo, dagfinn@sosialurin.fo

***Haldarar,*** *sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja tel. 341818 frá kl. 8.00 til 20.00 og boða frá.*